# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Við Múrin stóð sína roynd

Nýggjasta slagskipið í føroyska tónleikaflotanum - við Múrin - fór trygt av bakkastokki seinasta vikuskiftið. Jomfrúferðin gekk eisini væl, hóast fleiri brek vóru – byrjunartrupulleikar, sum tað uttan iva ber til at rætta uppá til næstu ferð.

Hesin spildurnýggi festivalurin, sum var ikki sørt djarvur, nú ungdómar í túsundatali skuldu valfarta til mentanarhøvuðsstað føroyinga, Kirkjubø, er helst komin fyri at verða. Sjálvandi vóru tað tey, sum bóru ótta fyri, at so stórt tal av fólki bæði so og so kundi órógva ella skemma hetta søguliga fyri ikki at siga, heilaga pláss. Mæti listamaðurin Tróndur Patursson hevði á munni undan festivalinum, at skuldi Kirkjubøur hýsa einum festivali, so átti tað at verið ein mentanarfestivalur, har onnur mentan enn júst popptónleikur var skjaldramerkið.

Nú festivalurin er av, og vit bæði hyggja í bakspeglið og frameftir, kundi tað kanska verið eitt gott hugskot til næstu ferð at bygt festivalin út til eisini at umboða hámentan av ymsum slag. At føroyskur ungdómur í stórum tali úr øllum oyggjum búleikast í Kirkjubø eitt vikuskifti átti eisini at verið positivt. Eingin orsøk er til, at hetta søguliga stað bara verður halgað fremmandum ferðafólkum. At eisini okkara uppvaksandi ættarlið fær eina kenslu av hesum plássinum er bara gott. Ein kann siga, at hevur festivalurin megnað at fáa ungfólk til Kirkjubøar, sum kanska ongantíð hava vitjað her, so er eisini nógv vunnið. Góður tónleikur og gott lag, eisini veitslulag, kann vera góður duraopnari til hetta mentanarstað okkara. Tað eiga vit ikki at undirmeta.

Samanumtikið eydnaðist tiltakið væl, tó at alt ikki riggaði, sum tað átti. Eitt nú vóru wc-umstøðurnar ov vánaligar eins og tað hevði komið væl við við fleiri veitingarplássum. Og hóast mong góð og kend nøvn, so hevði tað ikki verið nakað vánaligt hugskot við eitt sindur av hámentan eisini á tónleikaøkinum nærri Múrinum.

Føroysku bólkarnir stóðu seg væl. Serstakliga vilja vit taka fram Týr, sum týskarar hava hoyrt meira til enn vit føroyingar. Tað var stórsligið at síggja og hoyra Týr spæla frammanfyri eini stórari mannfjøld – við teirra útleggingum av eitt nú føroyskum kvæðum.

Ungdómurin hugnaði sær óført, og heldur ikki hesin festivalurin skuffaði. Hann gjørdi ikki hol í tey góðu hagtølini Føroyar eiga. Vit eru framvegis ein tjóð, har kriminalitetur, valdgerðir og slagsmál liggja lágt í hagtølunum. Kanska hetta eisini hevur nakað við okkara náttúru at gera, at hon dregur og fær fram tað góða í okkum. Fær okkum at sissast og gleðast heldur enn at vilja stríð og hvørjum øðrum ilt.

Við Múrin festivalurin var eitt djarvt nýbrot í føroyskari festivalsøgu. Vónandi verður hetta ikki seinastu ferð, og vónandi fara stigtakararnir, sum hava gjørt eitt veldugt arbeiði, at taka til sín tað, sum kundi verið betri. Tey, sum góvu loyvi til festivalin og bygdafólkið annars eiga eisini stóra tøkk uppiborna fyri at hava víst teimum ungu hetta stóra álit. Góða eydnu víðari øll somul. Nú gleða vit okkum til G!

**Sosialurin**

## Vinnuskúlin og útbúgving

VIBERG SØRENSEN



Tað eru stór tíðindir í fjølmiðlunum at nú sleppa 32 næmingar fleiri inná pedagog og læraraskúlan. Næstan dupult so nógv sum ætlað.

Hetta er gott fyri tey sum hava søkt, tað er teimum væl unt og at útbúgva seg er altíð gott. Eg skilji væl landstýriskvinnuna í mentamálum, hennara uppgáva er at so nógv sum vilja útbúgva seg skullu fáa møguleikan.

Tað sum fær meg at skriva hesar reglur er at tað eru bert nakrir fáir dagar síðani at Vinnuháskúlin boðaði frá at teir máttu siga nei til 18 næmingar sum høvdu søkt um at koma á skúlan. Ein eykajáttan uppá umleið 250 túsund krónur til skúlan var avvíst.

Eg veit ikki um hetta er tilvitað, at rákið í føroyska samfelagnum er vent handan vegin ella ikki, men eg stúri fyri gongdini og skilji ikki raðfestingarnar hjá landsstýriskvinnuni.

Tað sær út til at teoriin um at vit skulu liva av at klippa hvør øðrum skal roynast í praksis.

## Jógvan Skorðheim og útjavning

JÁKUP SÍMUN SIMONSENA
býráðslimur og havnanevndarformaður



Tað er ikki sørt av ábreiðslum Jógvan Skorðheim virkandi borgarstjóri í Klaksvíkar kommunu kemur við, ímóti høvuðsstaði Føroya og Tórshavnar kommunu í grein í Norðlýsinum.

**Útjavning**
Tá talan er um útjavning, so situr ein bólkur í landsstýrinum við eini ætlan, sum gera at einar 50. til 60. milliónir skulu gjaldast út úr Tórshavnar kommunu til restina av landinum. Tað partvísa innlit eg havi fingið í hettar uppskot er, at endamálið í sær sjálvum er at fáa fatur í peningi til at javna til kommunur, ið hava tikið ov rívan til, og sostatt kunnu yvirliva politiskt ístaðin fyri at verða settar undir umsiting av Fíggjarmálaráðnum. Útrokningargrundarlagið tyksit ógvuliga ivasamt, og hevur nógvar slagsíður.

Tað er nú einaferð soleiðis, at Tórshavnar kommuna er lokomotivið í Føroyum. Uttan at taka nakra frá nøkrum, so ynskja fólk at flyta til høvuðsstaðarkomununa, og tær kanningar, sum eru gjørdar ímillum útisetar har teir verða spurdir hvar teir vilja búgva, tá teir flyta heimaftur, so er greitt svar ímillum so at siga øll, at tey ynskja at búseta seg í høvuðsstaðnum.

Eg taki eisini fult undir við teimum sjónarmiðum, sum Heðin Mortensen borgarstjóri í Tórshavanr kommunu hevur ført fram seinastu tíðina.

**Framleiðsla og fiskivinna**
Tað er at fegnast um, at ogn Føroya fólks – fiskivinnan og tær avleiddu vinnur av hesum - er býttar so javnt runt út um landið, sum skapar virksemi og framburð Føroyum at frama. Har er Klaksvík ímillum teirra. Jógvan nevnir eina røð av fiskavirkjum runt landið, men gloymir tó at nevna Fiskavirking í Havn – fyrrverandi Bacalo – ið var tað fyrsta flakavirkið í landinum.

**Tórshavnar Havn**
Jógvan Skorðheim fær tað at ljóða, sum at Havnin fer avstað við øllum inntøkunum fyri fisk, sum verður virkaður runt um landið.

Til hettar er at siga, at í fyrsta lagi verður fiskur landaður til landingarstøðir og virkir runt landið. Tann havnin har fiskurin verður landaður tekur vanliga eitt vørugjald.

Tá fiskurin er virkaður, verður ein stórur partur fluttur í bingjum av landinum, um Tórshavnar havn. Tað verður tó ikki allur fiskurin avskipaður við bingjum um havnina í Havn, ein partur verur fluttur um havnina á Toftum.

Tórshavnar havn hevur gjørt stórar íløgur fyri at kunna taka móti bingjum, og er tað tí rímulig at havnin fær eitt vørugjald, tá fiskurin verður avskipaður, eins væl og tann havnin har fiskurin verður landaður fær eitt vørugjald.

Stýrisskipanin hjá Tórshavnar havn sigur, at yvirskotið av virkseminum skal brúkast aftur til íløgur vinnulívinum at frama, soleiðis at Tórshavnar havn altíð er klár at ganga framtíðini á møti. Hettar ikki minst neyðugt, nú skipini verða alt størri og størri. Hettar hava fyrrverandi havnanevndir við góðari leiðslu og manning hjá Tórshavnar havn sæð, sum eitt alneyðugt aðalmál fyri at bjóða framtíðini av fyri eitt oyggjasamfelag mitt í norðurhøvum – øllum Føroyum at frama.

Fari hervið at bjóða Jógvani ein túr suður á havnaskrivstovuna har vit saman við leiðsluni kunnu gjøgnumganga virksemi og viðurskiftini annars, soleiðis at Jógvan er betur førur fyri at greiða síni sjónarmið í rætta samanhanginum.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.